# Uppboðssølan byrjar av nýggjum

**– Eg haldi, at vit saman kunnu náa einum betri úrsliti til gagns fyri allar partar, tá ið fleiri progressivar kreftir eru við. Alt, sum kann tæna sakini, verður við í nýggja felagnum, har vit fara at seta út í kortið av nýggjum, sigur Óli Jacobsen, nevndarformaður í Fiskamarknaði Føroya**

FISKAMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tann 18. oktober fer ein eykaaðalfundur í Fiskamarknaði Føroya at taka støðu til eitt "konsept" við eini nýggjari uppboðssølu, har Fiskamarknaður Føroya (FMF) eigur annan helmingin av partapeninginum og Ráfiskaseljarafelagið hin.

Ráfiskakeyparar eiga frammanundan lut í FMF og verða soleiðis framhaldandi partur í ætlanini.

Samstundis, sum nýggj uppboðssøla verður skipað í nýggjum felag, fer Fiskamarknaður Føroya at reka verandi virksemi á Toftum sum landingarmiðstøð.



*– Nýggja uppboðssølan verður eitt nýtt blað, har vit saman fara at seta út í kortið av nýggjum. Tað gamla verður burtur, og vit hava eitt nýtt høvi at byrja av nýggjum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Allir partar umboðaðir

Ætlanin var, at trý feløg skuldu vera um nýggju uppboðssøluna, har FMF skuldi eiga 50%, Ráfiskakeyparafelagið 25% og Ráfiskaseljarafelagið 25%. Semja var ikki um hesa ætlan, tí Ráfiskaseljarafelagið í seinasta tíma kundi ikki taka undir við henni. Nú verða so kortini allir partar umboðaðir, men bara undir einari aðrari skipan.

Um eykaaðalfundurin hjá FMF samtykkir nýggju ætlanina á eykaaðalfundi, 18. oktober, fer Fiskamarknaður Føroya, har ráfiskakeyparar eisini eru við, at eiga 50% og Ráfiskaseljarafelagið 50%.

Spurdur, nær nýggja felagið verður stovnað og fer undir virksemi sítt, sigur Óli Jacobsen, nevndarformaður í Fiskamarknaði Føroya, sigur, at tað veit hann ikki í løtuni, men hann væntar, at tað verður skjótt.

– Nú er so nógv tosað um hetta málið, at tað má verða heilt skjótt, sigur hann.

### Byrja av nýggjum

Vit spurdu eisini Óla, hvat tað kemur at merkja í praksis, at eitt nýtt felag við fleiri eigarum kemur at reka uppboðssøluna:

– Tað er ilt at siga, men við hesi nýggju skipan koma allir partar, sum eru knýttir at fiskivinnuni, at eiga uppboðssøluna.

Fiskimenn eiga sum er í uppboðssøluni umvegis Føroya Fiskimannafelag, og arbeiðsfólk eiga eisini í partafelagnum umvegis arbeiðsmannafelagið á Toftum. Umvegis fiskavirkini eiga ráfiskakeyparar í felagnum, og nú koma so ráfiskaseljararnir eisini við uppí felagið.

– Nýggja uppboðssølan verður eitt nýtt blað, har vit saman fara at seta út í kortið av nýggjum. Tað gamla verður burtur, og vit hava eitt nýtt høvi at byrja av nýggjum.

Óli Jacobsen heldur, at alt og øll kunnu gerast betur, og soleiðis eisini við verandi uppboðssølu.

– Jú, eg haldi, at vit saman kunnu náa einum betri úrsliti til gagns fyri allar partar, tá ið fleiri progressivar kreftir eru við. Alt, sum kann tæna sakini, verður við í tí nýggja felagnum, sigur hann.

John Nielsen, sum er stjóri á Fiskamarknaði Føroya, hevur sagt seg úr starvi, og nýggjur stjóri verður settur til nýggju uppboðssøluna.

Í løtuni virkar Oskar Joensen sum stjóri í felagnum.



*Samstundis, sum nýggj uppboðssøla verður skipað í nýggjum felag, fer Fiskamarknaður Føroya at reka verandi virksemi á Toftum sum landingarmiðstøð*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Kósin væntar bátar í vikuni

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin arbeiddu tey upsa á Kósini í Klaksvík. Virkið hevur keypt upsa frá Beta í Saltangará, har skipini, Bakur og Stelkur, landaðu mánamorgunin.

Á Kósini vænta tey annars línubátarnar inn seinni í hesi vikuni. Nakrir eru undir Føroyum, og nakrir eru undir Íslandi, eitt nú Klakkur og Jákup B.

Nøkur skip eru liðug við kvotuna undir Íslandi, sum í heyst royndist rættiliga væl.

Polarstjørnan er millum teirra, sum hava gjørt tað gott undir Íslandi í heyst. Teir vóru tveir túrar har yviri og høvdu eini 190.000 pund hvønn túrin.

Íslandskvotan hevur havt stóran týdning fyri línuskipini í heyst, nú minni hevur verið at fingið undir Føroyum.

# Seks túrar á rað við fullari last

**Síðan Bakur og Stelkur komu aftur úr Spaniu tíðliga í heyst hava teir gjørt seks góðar túrar. Ongan túr hevur veiðan verið minni enn 300.000 pund**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast upsaprísurin hevur verið lágur, kemur upsin kortini væl við hjá skipum og virkjum, nú so lítið er at fáa av toski.

Trolararnir, Bakur og Stelkur, hava gjørt seks góðar túrar, síðan skipini fyrr í heyst komu aftur úr Spaniu, har tey vóru til garantieftirlit og ymiskar broytingar.



Ragnar Olsen, stjóri hjá Beta, sigur, at skipini hesar seks túrarnar ongantíð hava havt minni enn 300.000 pund, og soleiðis var eisini, nú tey vóru inni mánadagin.

– Skipini hava verið so at siga full undir lúkurnar hvønn einasta túr, sigur hann.

Ragnar vísir á, at upsin, sum skipini fáa, hevur verið heldur frægari til støddar í seinastuni, men hann heldur, at hendan túrin var fiskurin aftur meira smáttfallandi.

– Nógvur upsi er at fáa. Skipini byrjaðu hendan túrin seinasta hósdag, og í morgun eru tey longu inni aftur, visti Ragnar at siga mánamorgunin.

### Tvey onnur skip

Mánadagin lógu tvey onnur skip landingarklár á Beta.

Garnaskipið, Oknin, hevði stívliga 20.000 pund av svartkalva og nakað av toski, og línubáturin, Hvítabjørn, hevði eini 30.000 pund, harav 2/3 av veiðini var hýsa og 1/3 toskur.

Ragnar Olsen væntar, at Gorpur og Skrápur og Trastur og Skarvur eisini koma inn at landa seinni í hesi vikuni.



# Bíðirøð eftir grind

**Grind var í Havn leygardagin. Tað er ikki hvønndagskostur, og tískil mundi tað koma sera væl við hjá nógvum, at partarnir vórðu býttir soleiðis sundur, at bæði drápspartar og heima-partar vóru at fáa. Bíðirøðin var í øllum førum tekin um, at mong í høvuðsstaðnum vóru svong eftir einum grindabita**

GRIND
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Fólk gjørdust bilsin, tá tey komu eftir pørtunum. Tað vísti seg, at mong høvdu ov smá íløt við sær og fóru tey tí ovurhondsfegin heimaftur við grind og spik*

*Mynd: Árni C. Joensen*

Ein nýggj skipan varð roynd í høvuðsstaðnum um vikuskiftið, tá grindin skuldi skiftast. Tey umleið 2.200 skinnini vórðu býtt sundur í drápspartar og heimapartar.

Tórshavnar kommuna hevur ikki havt ta skipanina, at býta sundur í bátapartar. Ei heldur varð tað mett skilagott at býta partarnar upp í býlingar, so tískil kom hugskotið á borðið, um hví ikki at býta út til tey fólkini, sum vilja hava grind.

Kunngjørt varð, at tey, ið vilja hava grind, kundu tekna seg á ein lista hjá kommununi. Á hesum listanum standa nú umleið 6.500 fólk umboðandi 2017 húski. Men hesin listin veksur sum skilst allatíðina.

Hetta skuldi vísa seg at eydnast sera væl. Av teimum 2.200 skinnunum fóru 1.410 til drápspartar. Restin fór so til heimapartar.

Síðani varð lýst í útvarpinum leygar- og sunnudagin, at fyrst kundu tey, ið høvdu skrivað seg upp, koma eftir teirra parti. Og seinni, um nakað var eftir, kundu so fólk, ið ikki høvdu skrivað seg upp eisini koma.

Jens Marius Poulsen, hjálparmaður hjá sýslumanninum í Suðurstreymoy, letur sera væl at hesari skipanini, men sigur, at ein vansi tó var.

– Fólk stóðu í bíðirøð í næstan tveir tímar. Tað var galið við okkara skrásetingarskipan. Hon vísti seg at vera ein fløskuhálsur, sum vit ikki vistu um tá, men tað skulu vit fáa bøtt um til eina aðru ferð, sigur hann. Tað er tó upp til sýslumannin, um hendan skipanin verður nýtt aftur. Og sum skilst, so helt hann hana virka sera væl í sambandi við hetta drápið.

Jens Marius greiðir frá, at tá fólk komu eftir teirra parti, so lat til, at tey ikki høvdu væntað, at fáa so nógv, sum tey fingu.

Fleiri komu við ov smáum íløtum og gjørdust sjónliga bilsin, tá tey sóu mongdina, sum tey fingu við sær heimaftur.

Hvør partur var ein tíggjundapartur av einum skinni. Ein slíkur vigar um 75 kilo, og var helvt um helvt grind og spik til hvønn.

# Metsítt hár

**Systrarnar Sheila og Wivika T. Strøm á Tvøroyri koma aftur í ár í Bønenes Rekordbog, tí tær eru systkini, ið hava síðasta hárið í ríkinum. Men harafturat kemur Sheila í ár við, tí hon einsamøll hevur síðasta hárið**

HÁRMET
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nú Wivika hevur klipt sær, er Sheila eina um at hava sera sítt hár í familjuni Tjaldrastein Strøm á Tvøroyri. Tær eru 3 systrar, ið allar hava latið hárið grógva, til tær náddi fermingaraldur. Nú er bert Sheila eftir við metsíðum hárið.



*Systrarnar Wiwika og Sheila T. Strøm eiga metið í Børnenes Rekordbog fyri systkin við síðasta hárinum. Men nú Wiwika hvur klipt sær, eigur Sheila eisini metið sum persónurin við síðasta hárinum. Tær fara av landinum í dag í samband við útgávuna av Børnenes Rekordbog 2005*

*Mynd. D. Olsen*

Wivika og Sheila komu í fjør við í Børnenes Rekordbog 2004 sum syskin við síðasta hárinum. Wivika hevði hárlongd á 1,29 metrar og Sheila 1,31 metrar. Tær tóku tá egna met sítt, ið var 1,20 og 1,22.

Nú eru tær framvegis í bókini fyri 2005, tí ongin hevur tikið metið frá teimum. Men harumframt kemur Sheila eisini einsamøll í kappingargreinina, sum nevnist "Individuelt". Hon hevur nevniliga síðasta hárið, sum 26/6-04 varð mált til 1,47 metrar.

### Til móttøku

Hetta er sostatt aðru ferðina, at tær koma í bókina og aðru ferðina, at tær fara til Danmarkar í samband við útgávumóttøku. Bókin kemur út 23/10-04.

Útgávuhaldið verður hildið í Kattegatcentret í Grenaa. Til staðar vera m.o. danski mentamálaráðharrin og ymsir miðlar, t.d. DR tv junior.

Hóast familjan sjálv skal gjalda ferðina, so ivast mamma og døtur ikki í at fara. Tær gleða seg almikið og eru sera spentar, og hesaferðina verður mynd av systrunum í bókini. Tað skuldi eisini vera seinast, men onkursvegna kom villa í hesar ætlanir.

Systrarnar fara av landinum í dag til systrina, sum býr í Danmark, at gera seg kláran til alt hóvastákið, ið óivað er í samband við slíkt útgávuhald.

## Sam flytur rampuna

Í dag týsdagin verður rampan til ferjuleguna á Syðradali flutt yvir til Kalsoynna. Tað verður strandfaraskipið Sam, sum skal taka sær av flutninginum. Ein krani, sum er komin til landið til sama endamál, skal eisini flytast. Rampa og krani verða við politifylgi flutt til Leirvíkar náttina fyri.

Hetta er ein avtala millum Tórshavnar Skipasmiðju og Strandferðsluna, sum fer at hava við sær, at Sam ikki røkir sínar vanligu sigling um Leirvíksfjørð í dag. Men um alt gongur eftir ætlan, so kann væntast at Sam fer aftur í sigling seinnapartin.

Byggiharrin væntar annars, at til ársskiftið er arbeiðið við ferjuleguni á Syðradali komið so væl áleiðis, at nýggja Kalsoyarleiðin verður tikin í nýtslu tá. Strandfaraskip Landsins arbeiða við nýggju ferðaætlanini, og verður hendan væntandi klár í november.

**- sae -**

## Ókeypis busstúrur

Sum nakað nýtt verður møguleiki hjá eysturoyingum, sum ætla sær til Havnar á DJ-show og karaokekapping, koyra ókeypis við bussi bæði suður og heimaftur.

Tekning fer fram á tlf 225163, men túrurin er treytaður av, at nóg nógv tekna seg, siga fyrireikararnir.

Fyrireikararnir lova eitt brak av einum kvøldi, nú leygarkvøldið. Vælumtókti DJ´arin DJ Switch og Jákup Jacobsen sum dugir sera væl at seta lív í, fara at rokka húsið. Ætlanin er at hava eina karaoke-kapping har tað er møguleiki at vinna eina peningagávu, og har tað er áskoðarin, ið ger av, hvør vinnur.

Tað hevur í seinastuni verði eitt sindur av óskili í, viðvíkjandi afturlatingartíðunum í Badmintonhøllini. Men framyvir, tá ið dansur og onnur líknandi tiltøk eru í Badmintonhøllini, enda tey kl.03:30.

Tiltakið byrjar leygarkvøldið kl.23:30 og endar sum áður nevnt kl.03:30. Bussur koyrir eisini úr Vágunum og Vestmanna. Ring á tlf. 21 77 52.

**- sae -**